Skúlin við Gjógv latin aftur

Lykilin var í dag snaraður endaligt í skúlanum við Gjógv. Tríggir næmingar hava gingið har seinastu árini, og tá ein nú flytir til Glyvrar, ynsktu foreldrini at flyta hini til Oyrarbakka í skúla

SKÚLI
Rógvi Nybo
rogvi@sosialurin.fo

Ein kapittul er liðugt í Gjáar søgu. Í nógv ár hevur skúli verið við Gjógv, og tá tey vóru mest – undir 2. heimsbardaga – lá talið av næmingum omanfyri 50. Síðan tá hevur talið av næmingum verið støðugt fallandi, og seinasta hálva árið hava bert tríggir næmingar verið í skúlanum.

Í dag varð lykilin tó snaraður fyri seinastu ferð. Tað váttar borgarstjórin í Sunda Kommunu, Kim Durhuus.

Sunda kommuna hevur, saman við Eiðis kommunu í longri tíð arbeitt við at umskipa skúlaøkið, men hetta er ikki orsøkin til, at skúlin nú letur aftur við Gjógv.

Seinasta hálva árið hava bert tríggir næmingar verið í skúlanum við Gjógv, eitt sysktinapar úr Gjógv og ein drongur av Eiði.

- Men tá næmingurin av Eiði nú skal flyta til Glyvrar, so verður tað heldur einsligt hjá teimum báðum syskjunum. Man hevur altíð børnini fremst í huga, so nú ynsktu foreldrini at flyta tey bæði til Oyrarbakka at ganga í skúla, sigur Jan Thomsen, lærari.

Jan Thomsen hevur verið lærari við Gjógv seinastu 11 árini, og hann sigur, at tað er ein løgin kensla.

- Eg hugsaði um tað í morgun, tá eg koyrdi til Gjáar, og nú tá eg koyrdi heimaftur, at nú var hetta also seinastu ferð. Eg havi nú verið har í 11 og eitt hálvt ár, og havi havt tað ótrúliga gott, so tað er ein løgin kensla, sigur Jan Thomsen, sum nú fer við børnunum á Oyrarbakka at undirvísa.

Børnini, lærarin og foreldur hugnaðu sær í dag í skúlanum við Gjógv við rísalamande og øðrum, áðrenn lykilin varð snaraður fyri seinastu ferð.

VEÐRIÐ



Veðrið í morgin
Andøvsgul upp í ein strúk av norði, sum gjøgnum dagin snarar í ein útnyrðing. Út á dagin minkar hann vindin til gul til stívt andøvsgul. Mest skýggjað og turt, men út á kvøldið verður vátakavi ella kavi og vindurin veksur. Hitin millum 1 og 5 stig, men um náttina niður á 4 kuldastig.



Veðrið leygardagin
Skrið av norðuri og útnyrðingi, eitt skifti upp í storm. Skýggja og kavi ella kavæl. Hitin verður millum frosmarkið og 4 kuldastig.



Veðrið sunnudagin
Skrið av útnyrðingi og norðuri, men um kvøldið minkar hann vindin eitt sindur. Skýggja og kavæl. Hitin verður frá frostmarkinum til 4 kuldastig.

Veðrið mánadagin og týsdagin
Mánadagin stívt andøvsgul upp í ein strúk av norðuri, sum snarar í ein landnyrðing. Skýggjað við kavaælum. Hitin frá frostmarkinum til fýra kuldastig. Týsdagin minkar hann vindi til gul til stívt andøvsgul av landnyrðingi. Skiftandi skýloft við kavaælum. Hitin um frostmarkið.

Hitalagið kring knøttin

Illulisat	-16
Nuuk	-10
Qaqortoq	--
Ammassalik	-4
Saint John's	--
Halifax	--
Reykjavík	4
Seyðisfjørður	5
Tórshavn	8
Lerwick	7
Aberdeen	7
London	10
Tromsø	--
Bergen	5
Oslo	--
Stokkhólm	5
Keypmannah.	5
Helsinki	1
Moskva	-4
Berlin	3
Warzawa	1
Kiev	3
Bukarest	6
Paris	11
Madrid	47
Róm	15
Malorca	17
Athen	15
Malta	15
Tunis	16
Beijing	3
New Dehli	24
Bangkok	30
Jakarta	--
Sydney	--
New York	4
Miami	27
Los Angeles	13
Meksikobýur	--
Panama	32
La Paz	15
Rio de Janeiro	--
Buenos Aires	15

LUFTTRÝSTIÐ

Síðstu nátt:



Komandi nátt:



HITALAGIÐ



Hitalagið mált frá 10/12 kl. 06⁰⁰ – 11/12 06⁰⁰. Hitin í gjár: 7,1°
Minsti hiti máldur í desember: -10,5° -
Mesti hiti máldur í desember: +13,7°

AVFALLIÐ



Avfallið: 1,0 mm – mált frá 10/12 kl. 06⁰⁰ – 11/12 06⁰⁰.
Avfallið higartil í desember: 54 mm

Forelskað?

Vís tað í Sosialinum

javni
– Virkin og virðismikil
www.javni.fo

VESTFALLSKYRRINDI

16. desember	Tendring
20. desember	Mánin longst frá jørðini
24. desember	Fyrra kvarter
31. desember	Fullmáni
1. januar	Mánin næstur jørðini

Kelda: Almanakkin 2008

Dagur	Suðuroyar-/Vágafirði fp.	Suðuroyar-/Vágafirði sp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði fp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði sp.	Hestfirði/Sundalagnum fp.	Hestfirði/Sundalagnum sp.	Vestmannasundi fp.	Vestmannasundi sp.	Mykinesfirði fp.	Mykinesfirði sp.	Nólsoyarfirði fp.	Nólsoyarfirði sp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi sp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi fp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi sp.	Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp.	Kalsoyar-/Svínoyarfirði sp.	Hvannasundi fp.	Hvannasundi sp.	Fugloyarfirði fp.	Fugloyarfirði sp.
17. des	07:04	19:29	06:04	18:29	06:19	18:44	09:04	21:29	10:04	22:29	05:19	17:44	04:19	16:44	07:19	19:44	08:19	20:44	06:49	19:14	08:04	20:29
18. des	07:52	20:16	06:52	19:16	07:07	19:31	09:52	22:16	10:52	23:16	06:07	18:31	05:07	17:31	08:07	20:31	09:07	21:31	07:37	20:01	08:52	21:16
19. des	08:38	21:00	07:38	20:00	07:53	20:15	10:38	23:00	11:38	-	06:53	19:15	05:53	18:15	08:53	21:15	09:53	22:15	08:23	20:45	09:38	22:00
20. des	09:21	21:43	08:21	20:43	08:36	20:58	11:21	23:43	00:00	12:21	07:36	19:58	06:36	18:58	09:36	21:58	10:36	22:58	09:06	21:28	10:21	22:43
21. des	10:01	22:20	09:01	21:20	09:16	21:35	-	12:01	00:43	13:01	08:16	20:35	07:16	19:35	10:16	22:35	11:16	23:35	09:46	22:05	11:01	23:20